Standmyndin av Kjølbro:

# Avdúkast eina viku áðrenn Norðoyastevnu

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík sigur, at tey hava valt ikki at avdúka standmyndina á Norðoyastevnu, tí tá er so nógv annað á skránni. Ætlanin er, at hon skal verða avdúkað sunnudagin 26. mei**

STANDMYND
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** - Eitt tílíkt hátíðarhald, sum avdúkingin av standmyndini er, skal tað verða meiri friður yvir enn tað er, eitt nú á Norðoyastevnu, sigur Steinbjørn, sum samstundis vísir á, at so fáa allir Norðoyastevnugestirnir eisini høvi at síggja standmyndina.

Hann sigur, at dagurin er settur og at gongur arbeiðið, sum tað ger nú, so heldur tíðarætlanin. Standmyndin skal standa á økinum við Klaksvíkar Bókasavn og Norðoya Heimavirki. Økið verður nú fríðkað. Fundamentið undir standmyndini verður nú gjørt og flisar skulu leggjast fram við Bókasavninum og Heimavirkinum. Og so skulu blómukassar og benkur eisini setast upp á økinum.

- Vit hava valt at gera tað soleiðis, tí so verður tað einkult, men vakurt, greiðir Steinbjørn Jacobsen frá.

Men hann sigur eisini, at verkfallið órógvar eitt sindur kortini. Tilfarið skal fáast til vega og tað kann vera eitt sindur trupult nú, meðan verkfallið er.

- Alt verður so óvist av hesum verkfallinum, sigur Steinbjørn.

Í sambandi við avdúkingina av standmyndini av Kjølbro eru avvarandi hjá honum boðin til hátíðarhaldið.

Steinbjørn er tó skjótur at siga, at tiltakið er alment.

Tvær systrar hjá Kjølbro, sum búgva uttanlanda koma heim. Ein triðja systir hjá Kjølbro er búsitandi í Havn.

Standmyndin av Kjølbro er tann fyrsta av sínum slag nakrantíð, sum verður avdúkað í Klaksvík.



*Økið, sum standmyndin skal standa á, verður nú fríðkað*

Á festivali í Danmark:

# – Teitur er Gud



*Mynd: Bárður Eklund*

**Seinasta fríggjakvøld luttók Teitur Lassen á einum stórum tónleikafestivali í Århus. Og dómurin millum áhoyrarnar og ummælarar varð einfaldur : Teitur er Gud**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Talan var um tann sokallaða Spot-Festivalin, sum danski felagskapurin ROSA skipar fyri. Endamálið er at geva teim minni kendu tónleikarunum høvi at royna seg. Hesu ferð var føroyski Teitur Lassen so eitt av innsløgunum á festivalinum, og væl gekst hjá honum.

Festivalurin verður hildin í "Musikhuset" í Århus, har fleiri pallar eru karmar um tónleikaframførslur teir báðar dagarnar, ið festivalurin er.

## Góð variatión

Ein av hesum pallum kallast "Lille Sal", og tað var eisini á hesum palli, at Teitur rúnarbant teir 300 áhoyrarnar, sum vóru til staðar.

Við einum gittara, eini mikrofon og einum klaveri byrjaði Teitur stillisliga sína framførslu. Á heimasíðuni hjá festivalinum hevur ein ummælari skrivað, at Teitur Lassen megnaði at skapa eina góða variatión í framførsluni, og sat allur salurin púra hugtikin og lurtaði eftir honum.

Á heimasíðuni hjá ROSA verða nógv rósandi orð skrivaði um Teit. Lesarin fær millum annað at vita, at føroyingurin, sum longu nú hevur framleitt tónleik til væl umtóktu amerikonski sendirøðina "Jack & Jill", er væl at veg í tónleikaheiminum.

- Det tegner stoooort !, er dómurin á heimasíðuni um væntaðu tónleikakarrieru hansara í útlondunum.

Eisini fyrrveranadi forsangarin í danska bólkinum Dizzy Miss Lissy hevði fleiri rósandi orð at bera Teiti.

Tim Christensen, sum maðurin eitur, sigur á heimasíðuni, at Teitur var tað største yvirraskilsi á festivalinum, og hann metti Teit avgjørt at vera í einum heimsklassa.

## Gevur fløgu út

Men hóast væl gongur hjá Teiti í útlandinum, so er hann ikki farin longur burtur frá Føroyum enn so, at hann í summar gevur eina fløgu út á føroyska tónleikamarknaðinum. Fløgan ber heitið "Sólin og Regnið", og stendur Niclas Johannsesen sum framleiðari, meðan Óli Poulsen skal ljóðblanda fløguna.

Og er Teitur væl umtóktur í øðrum londum, so er hann tað so sanniliga eisini í Føroyum. So óivað bíða mong spent eftir hesi fløgu, sum væntandi fer at selja sum heitt breyð.

# Lastbilur kundi farið útav

**Stórur skaði kundi havt hent í Klaksvík mánadagin, tá ein lastbilur fór út av vegnum á Selheyggi í Klaksvík**




*Til alla lukku bleiv lastbilurin hangandi á hjólunum uppi á vegnum*

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Óhappið hendi um hálvgum fimm tíðina seinnapartin. Tað kundi havt verið heilt galið, um ikki lastbilurin bleiv hangandi á tveimum hjólum í vegkantinum, tí beint undir vegnum standa hús. Men bilurin bleiv sum sagt hangandi. Ein gravkúgv helt so bilinum, inntil ein kranabilur kom og háladi lastbilin upp aftur á vegin.

Løgreglan í Klaksvík sigur, at ikki er greitt júst hvat hendi og hví bilurin fór útav, men blóðroynd er tikin av manninum, sum so skal staðfesta, um maðurin var ávirkaður av rúsdrekka.



# Høgni Hoydal ein vónsvikin maður

**– Ein sjálvstýrissamgonga er til reiðar at halda fram við arbeiðnum, men bæði fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin vilja heldur ganga sambandsleiðina og tað harmar meg almikið, sigur Høgni Hoydal**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*



*Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins sigur, at sjálvt tá hann hugsaði tað allarringasta, hevði hann aldrin droymt um, at tað skuldi ganga so illa, sum tað hevur gjørt*

– Sjálvt tá ið eg hugsaði tað allar ringasta, hevði eg aldrin droymt um, at tað skuldi ganga so illa, sum tað hevur gjørt.

Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins, dylir ikki fyri, at hann er ógvuliga vónbrotin av, at samráðingarnar ímillum fólkaflokkin, tjóðveldisflokkin og sjálvstýrisflokkin um nýggja samgongu, skuldu slitna síðstu nátt.

Hann sigur, at hann hevði aldrin hugsað, at javnaðarflokkurin vildi so lítið á sjálvstýrisleið, sum hann í veruleikanum vil.

Men ikki minst er hann vónsvikin av, at bæði fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin fullkomiliga hava slept sjálvstýristilgongdini.

– Tað er týðiligt, at tað eru teir lægstu felagsnevnararnir og mest sambandssinnaður kreftirnar í teimum báðum flokkunum, sum nú seta markið. Tí kom tjóðveldisflokkurin brádliga at standa púra einsamallur á sjálvstýrisvonginum og tað harmar meg almikið, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur, at tá ið tjóðveldisflokkurin fór upp í hesar samráðingarnar, var hann greiður yvir, at tað var neyðugt at seta ferðina í sjálvstýristilgongdini munandi niður.

– Tað endaði við, at vit góðtóku at seta ferðina niður í 5% fyri at brúka eina mynd av støðuna. Vit góðtóku bara at fremja yvirtøkur fyri neyðars 20 milliónir um árið, men heldur ikki tað var nóg mikið. Og at tað ikki so frægt sum skuldi eydnast at fáa hinar flokkarnar at góðtaka, at arbeiðið at fyrireika yvirtaka løgreglu og rættarmál skilji eg ikki.

Høgni Hoydal sigur, at tað hevur tikið fleiri ár at fáa gongd á hetta arbeiðið og tí er tað fullkomiliga burturvið at sleppa tí aftur nú – serliga tá ið hugsað verður um, at javnaðarflokkurin fyri einum ári síðani segði, at rættarskipanin var tað fyrsta, sum mátti yvirtakast.

– Tað er at halda bæði danskar myndugleikar føroyskar myndugleikar fyri gjøldur heldur hann.

## Blokkurin kundi verið burtur

Høgni Hoydal sigur, at annars vildi tjóðveldisflokkurin góðtaka, at blokkurin varð ikki minkaður í komandi valskeiðnum.

– Men hóast vit strektu okkum so langt, sum vit yvirhøvur kundi, var ongin møguleiki at fáa hinar flokkarnar at taka undir við tí.

Hann sigur, at tað løgna er, at eftir samrøðum við sambandsflokkin, er tað púra greitt, at tað hevði borið til at komið minst líka langt á sjálvstýrisleið við honum, sum tað nú vísir seg at bera til at koma við fólkaflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og javnaðarflokkinum.

– Tað fyrikemur mær løgið, tí fyri nøkrum árum síðani gjørdi javnaðarflokkurin eitt uppskot um at regulera blokkstuðulin eftir búskaparligu gongdini í Føroyum, tvs, at tá ið uppgangstíðir vóru, skuldi blokkurin lækkast og øvugt.

– Síðani hevur búskaparliga gongdin í Føroyum gingið beint uppeftir og skuldu vit fylgt uppskotinum frá javnaðarflokkinum, hevði blokkurin verið burtur í dag, sigur Høgni Hoydal.

Formaður tjóðveldisfloksins sigur, at lagnan hjá sjálvstýristilgongdini nú stendur og fellur við tí, sum løgmaður ger.

– Vit vita, at ein sálvstýrissamgonga er til reiðar. Tað er bara at fáa miðflokkin upp í samgonguna, tí tað hevur hann alment og í samrøðum við okkum, boðað frá, at hann er sinnaður til. Bara soleiðis kunnu vit varðveita trúvirði mótvegis føroyska veljaranum og umheiminum.

– Tí er tað ómetaliga løgið, at fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin ikki vilja royna tann møguleikan, men heldur vilja sleppa øllum og fara sambandsleiðina, sigur Høgni Hoydal.

# Kvinnuskeið um sjálvsmenning

TÍÐINDASKRIV

Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 1.-2. juni í ár.

Skeiðleiðari er Anette Sundby. Hon var í Føroyum í heyst og helt eitt væleydnað skeið og hevur tí hug at royna hetta aftur.

»Ein ferð byrjar altíð við fyrsta fótafetinum,« sigur Anette Sundby, sum seinastu fýra árini hevur hildið serstakt skeið fyri kvinnur. Ein orsøk til, at hetta er kvinnuskeið burturav, kemst av, at kvinnur kenna seg tryggari og kunnu betur tosa um síni viðurskifti sínamillum, tá ið tær eru í bólki fyri seg.

Hon er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðvirksemi, har hon m.a. lærir kvinnur, hvussu tær kunnu mennast og soleiðis styrkja sjálvsvirðið.

»Nógvar kvinnur koma á hesi skeið, tí at tær hava hug at læra okkurt nýtt, ella tí tær standa á einum vegamóti í lívinum, har teimum tørvar at læra meiri um teirra persónligu eginleikar,« sigur Anette Sundby.

Orsøkin til, at hon hevur ment hesi serligu kvinnuskeið, er, at hon hevur verið fyri stórum mótburði í lívi sínum. Tað hevur gjørt, at hon ofta hevur ivast í sínum kvinnuvirði. Fyri at vinna á ivanum hevur hon stríðst fyri at endurskapa kensluna av síni styrki sum kvinna. Tað eru m.a. hesar royndir, sum Anette Sundby vil bera víðari til sínar medsystrar.

Skeiðið er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum. Ert tú áhugað fyri at læra okkurt nýtt, sum kann menna teg í arbeiðs- og persónliga lívinum, er hetta skeiðið kanska ein møguleiki.

Skeiðið er ikki nakar »undurkurur«, men meira ein byrjan til eina prosess, har tú fært hugskot og íblástur m.a. til at skapa broytingar í lívsgrundarlagnum, sum tú kanska droymir um, men ikki veitst, hvussu tú skalt fremja.

Á skeiðnum er møguleiki at gera sær tankar um lívið, at hugsa seg gjølla um og at arbeiða fram ímóti at seta sær nýggj stevnumið.

Skeiðið verður í Stoffalág 82, 1.-2. juni, frá kl. 9-17 báðar dagar. Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaðurin er 1850 krónur, íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at fara inn á heimasíðuna

www.anettesundby.dk.

Sí annars lýsing í blaðnum.